# ari á tað, sum



*– Suðuroyingar eiga at leggja alla oynna í eina kommunu og øll ítróttarfeløgini saman í eitt. Skulu vit ikki detta niðurímillum mugu vit standa saman í øllum, heldur Petur Hammer, sum her stendur í dalinum í Hovi og peikar inn ímóti hamrinum, har tunnilin verður skotin ígjøgnum. Tað var fyrst og fremst hann, sum reisti spurningin um at flyta tunnilin niður í dalin, har hann liggur best fyri og tað eydnaðist, tí tey, sum hava politisku og teknisku ábyrgdina av málinum, tóku skjótt undir við tí*

eru eisini nógvir hentleikar, sum tað er rætt at byggja víðari á.

Í Vági er djúphavn, stór frystigoymsla, skipasmiðja og stórt fiskavirki. Tað eiga vit at byggja víðari á, tí eg haldi, at tað vildi verið heilt burturvið at bygt frystigoymslu, djúphavn ella skipasmiðju á Tvøroyri eisini.

– Sostatt kann ein stórur partur av vinnulívinum miðsavnast í Vági. Høvdu øll skipini í Suðuroynni gjørt tær umvælingar, sum tilbar, í Vági, hevði Skipasmiðjan verið eitt stórt arbeiðspláss.

Og so er tað alingin!

– Tosað hevur verið um toskaaling. Lat hana vera í Vági og alt virksemi, sum er tengt at tí. Í Vági er eisini elverk og í tí sambandi eiga vit at miðja ímóti at fáa størri nyttu burturúr øllum hitanum, sum elverkið letur í luftina við roykinum og á sjógv við kølivatninum. Kanska kundi tað brúkst til at alt fisk við, sum kravdi heitt vatn?

– Og verður øll oyggin løgd í eina kommunu, kann umsitingin hjá kommununi fyri mína skyld verða í Vági, tí tað er so stutt í millum, at tað hevur onki at siga.

Samstundis haldi eg, at tað er rætt at byggja røktarheim í Vági, nú eitt er á Tvøroyri kortini.

### Eitt ítróttarfelag fyri alla oynna

Tey, sum eru komin upp í árini, vita, minnast Petur Hammer frá tiltikna sjeytiáraliðnum hjá TB, har hann var vongbakkur- og hann sigur, at TB var fyrsta lið í Føroyum, sum royndi seg við vongbakki.

Hann er framvegis TB-ari um ein háls.

– Men tað er er lítið hugaligt at vera á vøllinum í Vági ella á Tvøroyri og síggja allar teir fremmandu spælararnar renna runt á vøllinum.

– Tað má eisini stafestast, at nógvir av hesum útlendingunum eru ikki leikarar, sum skara framúr afturímóti teimum føroysku spælarunum og tað er beinleiðis burturspilt at brúka pening til útlendskar spælarar, sum ikki skara framúr.

– Vit hava tvey fyrstudeildarlið í Suðuroynni, sum eru aftast og næstaftast. Vit hava tvey aðurdeildarlið, sum eisini liggja heilt har afturi í deildini.

– Hetta hevur verið gongdin í fleiri ár og eg dugi ikki at síggja, hvat hetta er at byggja víðari á. Tí haldi eg avgjørt, at ítróttarfeløgini í Suðuroynni skuldu lagt saman í eitt oyggjarfelag.

– So kundu vit brúkt pengingin og orkuna til eitt gott lið í fyrstudeild og eitt gott lið í aðrudeild í fótbólti. Og var neyðugt við útlendskum styrki, høvdu ráðini verið til at fingið spælarar, sum veruliga gjørdu mun á liðnum, sigur Petur Hammer.

Petur Hammer ivast ikki í, at eitt felags suðuroyarlið hevði gjørt seg rættiliga galdandi í landskappingini.

Ì hesum sambandi heldur hann eisini, at tað einasta rætta er at byggja eitt veruligt oyggjarstadion saman við hinum hentleikunum í Trongisvági.

– Vøllirnir á Tvøroyri og í Vági koma ikki at nøkta tørvin í longdini og spurningurin er, hvussu leingi teir varðveita altjóða góðkenning. Men tað er at spilla pening burtur, at byggja ein vøll í Vági og ein á Tvøroyri. Tí haldi eg, at tað einasta rætta er at byggja eitt stadion fyri alla oynna á Tvøroyri, heldur tvørmaðurin, Petur Hammer.



*– Tað, sum Tvøroyrar Býráð ger, er ikki samstarv. Tað eru kravboð og tað er ikki fremjandi fyri samstarvið í Suðuroy, sigur Sølvi Andreasen, formaður í sosialu nevnd í Vágs býráði*

# Hava gjørt sítt ítarsta fyri at fáa samráðingar um barnavernd í Suðuroy

**Vágbingar og aðrar kommunur í Suðuroy føla seg eitt sindur kroyst av Tvøroyrar kommunu til at ganga undir eina semju um barnavernd**

BARNAVERND
*Àki bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er ikki Vágs Býráð, sum hevur seinkað arbeiðnum at finna semju um arnaverndina í Suðuroy. Tvørturímóti hava vit arbeitt av øllum alvi fyri at fáa gongd á málið.

Sølvi Andreasen er formaður í sosialu nevnd í Vágs Býráð og hann er alt annað enn samdur í tí, sum stóð á Portalinum leygardagin og í Sosialinum týsdagin um barnaverndina í Suðuroy.

Har varð sagt, at tær seks kommunurnar í Suðuroy tóku beinanvegin undir við, at tað skuldi vera ein barnavernd, men at Vágs Kommuna hevði drigið á, tí kommunan vildi heldur hava tvær barnaverndir í oynni.

– Hetta er ikki rætt, tí Vágs Býráð tók longu í mai mánaða undir við tankanum um at fara í samráðingar um eina felags barnavernd í Suðuroy. Allar hinar kommunurnar tóku eisini rættiliga tíðliga undir hugsktonum um eina barnavernd.

Tað, sum ørkymlar málið er, at Hóast Tvøroyrar Býráð longu 11. apríl tók undir við, at tað skuldi vera ein barnavenrd, hevur býráðið ikki boðað hinum kommununum frá avgerðini fyrrenn beint nú.

– Sostatt er tað Tvøroyrar Kommunu, sum vit hava bíðað eftir alla hesa tíðina, sigur Sølvi Andreasen.

Hann sigur, at Vágs Býráð hevur roynt at skumpa undir málið, men tá ið onki hendi, fór kommunan at kanna møguleikan fyri at skipa tvær barnaverndir og møguleikin varð eisini kannaður fyri at Vágs Kommuna kundu skipa engu barnavernd. Men tað skulu minst 1500 fólk verða til hvørja barnavernd og innlendismálaráðið vildi ikki gevaVágs Kommunu undantaksloyvi.

Men hesa tíðina, Tvøroyrar Býráð hevur drálað við at kunngera samtyktina um eina barnavernd, hevur tað ikki ligið á latu síðuni, tí tíðin er brúkt til at arbeiða fyri at skipa eina sosiala deild á Tvøroyri.

Býráðslimir á Tvøroyri hava ikki dult fyri at eitt endamál við tí er at hýsa umsitingini hjá teirri komandi barnaverndini.

– Niðurstøðan hjá mær er, at Tvøroyrar Býráð hevur brúkt hetta málið til at leggja trýst á hinar kommunurnar við, serliga Vágs Býráð, tí tað er við beráddum huga, at teir hava bíðað við at siga hinum kommununum frá avgerðini, sigur Sølvi Andreasen.

– Tvøroyrar býráð hevur nevniliga latið hinar kommunurnar vita, at nú verður sosiala deild á Tvøroyri og ein barnavernd undir henni og so eru hinar kommunurnar vælkomnar at samstarva um hana.

– Verða hinar kommunurnar ikki við, skipar skipar Tvøroyrar Kommuna barnavernd kortini uttanum hinar kommunurnar, tí tað er hon nóg stór til, hava vit fingið vita, sigur Sølvi Andreasen

Formaðurin í sosialu nevnd í Vágs Býráð fýlist á slíka mannagongd.

– Hetta er ikki samstarv, hetta eru kravboð, tí samráðingar hava ikki verið ímillum kommunurnar um barnaverndina, og tað er ikki fremjandi fyri samstarvið í Suðuroy annars, sigur hann.